# Byggidepilin, nú eisini við Invita Køkum

Byggidepilin heldur til í Jansstovugøtu 10, har teir m.a. fara at selja alskyns byggitilfar, køkar og baðirúm, vindeygu og amboð. Byggidepilin bjóðar eisini heildarloysnir, har kundin eftir egnum ynski, saman við verkfrøðingum, er við í byggingini. Stigtakarar til nýggju fyritøkuna eru Sigfríður á Plógv Hansen, Bergur Lútzen og Ari Thomassen. Byggidepilin arbeiðir í tøttum samstarvið við Viking Smíð og Sandavágs Timburhandli.

Byggidepilin ger bæði heildarloysnir, selur tilfar, dygdargóð amboð, vindeygu og hurðar, innbúgv, og sum nakað nýtt, nú eisini Invita Køkar.

## Byrjanin

Byggidepilin varð sett á stovn í 2007, og er tað í dag ein miðalstórur handil, ið selur byggitilfar og el amboð av vælkenda dygdarmerkinum Hitachi. Hondamboð fáast eisini av nýgga merkinum Kongsberg.

Eisini selja teir vindeygu og hurðar, úr plasti, træ/alu, furu og mahogny og alu/træ av merkinum Viking.

Síðst og ikki minst, eru teir á Byggideplinum byrjaðir at selja Invita Køkar, sum vit í Føroyum ikki vita nakað serligt um enn. Hetta er nakað, Byggidepilin ætlar at broyta.

Stovningarárið var í 2007, og eru tað virkini bæði; Sandavágs Timburhandil og Viking Føroyar, ið eiga eins stóran part í nýggju fyritøkuni.

## Menning

Fyritøkan hevur plásstrot, og til tess at mennast við tí títtleikanum, teir meta vera hóskandi, halda teir, at teir skulu byggja sær størri hølir. Nýggju hølini verður í í Vágum, og nú undirsóvartunnilin er komin, ber hetta eisini væ til. Eisini var tað væl bíligari at byggja nýtt, enn til dømis í Havn.

## Ætlanirnar

Byggidepilin ætlar at leggja dentin á Invita Køkar í næstum, og fara við nýggju hølunum, at vera førir fyri at seta sokallaði scenariur upp, so kundin sær eitt eintak, í staðin fyri at finna tað í einum faldara.



## Heildarloysnin

Tað eru nakrar ymiskar heildarloysnir uppá hús, ið Byggidepilin kann bjóða. Tað veri seg í skapi av sniðhúsum, har úrslitið er bíligt, men við vansanum, at man so ikki hevur nakað at siga, hvat snið skal nýtast. Eisini er møguleiki at levera skitsur inn til okkara, og saman við verðfrøðingum, finna teir røttu loysnina fyri kundan

*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*




Fleiri og fleiri velja nú træ/alu vindeygu. Orsøkin er, at fleiri fyrimunir eru við træ/alu vindeygum. Tey eru millum annað sera løtt at viðlíkahalda og geva gott inniumhvørvi.

Træ/alu vindeygu eru vanlig HDYGD vindeygu úr límtræi, sum eru viðgjørd, bæði innan og uttan, og síðani klødd við aluminium. Aluminium fæst í øllum litum og skal ikki málast aftur.



Superlágorkurútar við heitum kanti eru standard

VINDEYGUNI FÁAST VIÐ

**ymsum funktiónum:**

- toppsving
- síðusving
- síðuhongd
- topphongd

**10 ára trygd fyri:**

- døgg millum rútarnar
- rotskaðum (treytað av, at vit mála liðugt)
- at viðurin skjýtur seg og loysnar í lamineringini
- funktiónsfeilum á besløgum

VINDEYGUNI SIGA ALT

SENDISTOVAN

H DYGD

Í Geilini 2 | FO-385 Vatnsoyrar | Tel.: +298 332177 | www.hdygd.fo | post@hdygd.fo